# Deiggj spæla í Jelling

TÓNLEIKUR



Síðst í mai mánaði skal føroysku bólkurin Deiggj spæla á tónleikafestivalinum í Jelling. Danski festivalurin hevur áður havt føroyskar bólkar á pallinum hjá sær, og nú sleppur Deiggj fram at.

Legendan B.B. King úr USA er høvuðsnavn á Jelling Festivalinum í ár, men nógv onnur kend nøvn skulu eisini spæla á jútska festivalinum. DAD, Eagle Eye Cherry, TV2, Tim Christensen, Jokeren, Shu-Bi-Dua og onnur.

Deiggj hevur nógv ár á baki, og hóast tað var vorðið nakað friðarligt um bólkin, hava teir aftur vant og spælt javnt seinastu árini.

Endaliga skráin er ikki løgd fyri Jelling Festivalin, men hann verður hildin í døgunum frá 28. til 30. mai.

# Tobbi og Khader hava slættað sjógv

**Á samkomu á Christiansborg fríggjadagin í sambandi við, at Høgni Hoydal tók við fólkatingssessinum, hittust Naser Khader og Tórbjørn Jacobsen – og samdust aftur**

SEMJA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fríggjadagin bleiv »tað gott aftur« millum danska fólkatingsmannin, Naser Khader og Tórbjørn Jacobsen.

Stríðið teirra millum kom í hæddina, tá Naser Khader á føstulávint læt seg avmynda í føroyskum klæðum, meðan hann skírdi føroyingar fyri »norrønar muslimar«.

Tað var á móttøkuni hjá Norðuratlantsbólkinum í sambandi við at Høgni Hoydal tekur yvir fólkatingssessin, at Naser Khader og Tórbjørn Jacobsen slættaðu sjógvin. Naser Khader gav Tórbjørn Jacobsen eitt eintak av eini bók, hann hevur skrivað.

Naser Khader er fólkatingsmaður fyri Radikala Vinstraflokkin í Danmark, og hann er ofta í andgletti við sínum kontroversiellu hugsanum.

Naser Khader er føddur í Damaskus í 1963 og flutti sum smádrongur til Danmarkar saman við foreldrum sínum. Hann varð valdur í Fólkatingið fyri Radikala Vinstraflokkin í 2001.

(Lesið eisini frásøgn frá móttøkuni á síðu 17)



*Tórbjørn Jaocbsen tók tað sera illa upp, tá Naser Khader á føstulávint læt seg avmynda í føroyskum klæðum, meðan hann skírdi føroyingar norrøna muslimar*

*Mynd: Símun J. Hansen*

# Fínpussa fíggjarlógina

**Seinasta hond verður nú løgd á fíggjarlógaruppskotið, sum væntandi verður lagt fyri Løgtingið í næstu viku, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joesen*

Undirskotið á fíggjarlógini verður, sum væntað, helst einar 200-300 milliónir krónur í ár, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum.

Meira nágreiniliga vil hann ikki siga nakað um uppskotið, sum hann væntar, at hann fer at leggja fyri Løgtingið í næstu viku.

Arbeitt hevur verið við at gera fíggjarlógaruppskotið liðugt, og tað arbeiðið hevur gingið væl. Onkur hevur vilja havt eitt sindur meira í sín part, enn skotið hevur verið upp.

– Ósemjur hava ongar verið sum so. Menn hava arbeitt hugaliga og seriøst, sigur landsstýrismaðurin. Allir eru greiðir yvir, at sparingar eru neyðugar, men tær verða ikki so ógvusligar, sum onkuntíð hevur verið nevnt, sigur hann.

Nevnd hava verið tøl sum einar 400 milliónir, ið fara at vænta í fyri at fáa alt at hanga saman. Men slík tøl koma ikki upp á tal, sigur Bárður Nielsen. Tað ber stutt og greitt ikki til, tí so steðgar alt upp, sigur hann.

– Eitt undirskot upp á eina 200-300 milliónir á fíggjarlógini eitt ár, er til at bera. Men tað kann sjálvandi ikki halda fram, sigur landsstyrismaðurin.

Nú verður so fíggjarlógaruppskotið fyri 2004 fínpussað og redigerað, og vónandi fáa vit so eina fíggjalróg heilt skjótt, sigur Bárður Nielsen.

Tað skal skjótt farast undir at gera fíggjarlógaruppskotið til næsta ár, vísir hann á. Tað skal vera liðugt í september. Hvussu tá verður, er ikki gott at siga. Alingini kunnu vit ikki vænta tað stóra frá, sum støðan er nú. Sjúka hevur lagt so nógv alibrúk oyðin, at har verður einki tikið aftur fyrr enn í fyrsta lagi í 2006, og tískil eru sjálvandi heldur ongar inntøkur væntandi haðani.




I·net BREIÐBAND

| Nýtslutørvur | Nýtslumynstur | Prísur pr. mðr. | Ferð | Frí nýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Lágur | Surf, postur, chat og spæl | Kr. 280,- | 256k/128 | Eingin. 50 oyru/Mbyte. |
| Miðal til stórur | Surf, postur, chat, spæl og tónleikur | Kr. 595,- | 512k/128 | 2 Gbyte. Yvir 2 Gbyte: 50 oyru/Mbyte. |
| Stórur | Surf, postur, chat, spæl, tónleikur og filmur | Kr. 895,- | 1024k/128 | 3 Gbyte. Yvir 3 Gbyte: 50 oyru/Mbyte. |

Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-

- Upp til 20 ferðir skjótari enn uppringt samband
- Støðugt fast samband
- Tosa og surfa samstundis - ikki neyðugt við eyka linju
- Fleiri upplivingar á alnetinum

**Bíleggið nú og sparið kr. 750,-*) í stovning**

**Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...**

**) Treytað av at tú teknar I·net breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 31. mai 2004. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.*

FØROYA TELE

petur & petur • 320870



